## Føroyskt Meistaraheitið fyri Ung (FMU)

Fyri fyrstu ferð verður skipa fyri kapping um føroyameistaraheitið innan frælsan ítrótt fyri ung. Hetta verður leygardagin 12. august á Svangaskarið.
Kappast verður í fylgjandi bólkum:
Gentur og dreingir 10-11 ár (fødd 1995-96) kappast í 60m, 300m, 600m, longdarlopi og kúlustoyti.
Gentur og dreingir 12-13 ár (fødd 1993-94) kappast í 80m, 300m, 600m, longdarlopi og kúlustoyti.
Gentur og dreingir 14-15 ár (fødd 1991-92) kappast í 100m, 300m, 800m, longdarlopi og kúlustoyti.
Gentur og dreingir 16-17 ár (fødd 1989-90) kappast í 100m, 400m, 800m, longdarlopi og kúlustoyti.
Gentur og dreingir 18-19 ár (fødd 1987-88) kappast í 100m, 400m, 800m, longdarlopi og kúlustoyti.
Allir føroyingar, sum eru limir í einum av feløgum undir FÍF kunna luttaka.

Tilmelding ferð fram á www.athletics.fo. Seinasta freist fyri tilmelding er mikukvøldið 9. august. Tað er ikki gjørligt at melda til á staðnum.

## Svimjingin bíðar

Tað eydnaðist ikki at avgreiða kappsvimjingina um Nólsoyarfjørð um vikuskiftið, soleiðis sum ætlanin annars var. Leygardagin, tá svimjast skuldi, vóru veðurlíkindini ikki til at svimja á opnum havi, og tí varð í fyrstu atløgu valt at bíða til sunnudagin. Heldur ikki tá gekst eftir vild, og nú verður svimjingin fyribils flutt tvær vikur fram. Komandi vikuskifti er annars ovastevna í Nólsoy, men tá er harður streymur, og tí verður heldur ikki svomið tá.

**-mørk**

# LÍF hølvað av á Sandi

**Við sigri á heimavølli móti SÍ í ógvuliga svingandi uppgerð yvirtók AB uppflytingarplássið, sum LÍF í summarfrítíðini hevur sitið á**

1. DEILD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

### B71-LÍF

Tað er nógv, sum bendir á, at tað ikki fer at verða leygardags fótbóltur inni í Dal á Sandi næsta ár. B71 var undan summarfrítíðini millum fremstu evnini til uppflyting. Sandoyingar høvdu á fremsta plássinum sama stigatal sum LÍF. Tí var tað serliga spennandi, tá ið tey bæði oddaliðini sunnudagin hittust á Sandi.

Men talan gjørdist ongantíð um intensa oddauppgerð. Munurin á liðunum var alt ov stórur. B71 vann 6-1, og tað var ikki fyrrenn støðan var 6-0 og í síðstu sekundunum, at LÍF minkaði um munin við brotssparki, ið Allan Joensen, sum hesa ferð var í miðverjuni, setti í málið.

Eli Hentze setti hol á fyri B71 við brotssparki, eftir at Clayton Soares varð feldur. Jónsvein Thomsen er komin rættuliga fyri seg aftur, eftir at hann er komin aftur av skipi. Hann skoraði undan steðginum eftir uppspæl frá Clayton Soares, og tá ið hann tíðliga í 2. hálvleiki stútaði til 3-0 eftir innlegg frá Magnusi Olsen var alt avgjørt. Innskifti Rasmus Nielsen økti til 4-0 eftir uppspæl frá Eli Hentze og Clayton Soares, og Soares økti til 5-0, eftir at hann hevði sneitt seg einsamallan við Rógva Ryggshamar, sum royndi at verja LÍF málið, men ikki fekk so nógva hjálp frá sera tomu viðspælarunum. Clayton átti fyrru royndina, tá ið Magnus Olsen eftir hálvbjarging frá Rógva Ryggshamar skoraði til 6-0.

Leirvíkingar vóru stórt vónbrot. Eina løtu í 2. hálvleiki høvdu teir bóltin ikki so lítið, men tað var als eingin broddur í. Leygardagin skulu teir spæla á Sevmýri, og um hugburðurin ikki verður øðrvísi móti TB, enn hann var hesa ferð, so kunnu teir í Leirvík ikki rokna við at fáa nakað við sær aftur um Suðuroyarfjørð.

### AB-SÍ

AB hevði vitjan av SÍ, og argjamenn vunnu 6-3. Tað var eitt fitt lot á Argjum, og tað var ógvuliga hendingarríkt. Bæði liðini høvdu nógvar málmøguleikar. Munurin var tann, at AB – og serliga Tummas Hans Rubeksen og Allan Mørkøre – dugdu at fáa úrtøku burrturúr, meðan sørvingar misnýttu nógvar møguleikar.

Allan Mørkøre átti uppleggið til fyrsta málið, sum Tummas Hans skoraði, tá ið hann kom einsamallur móti málverjanum. Eftir at Marcello Marcelino við einmansavriki hevði javnað til 1-1, gekk ein løta, áðrenn Allan Mørkøre spældi Tony Rasmussen leysan, og so var 2-1.

Tummas Hans Rubeksen skoraði til 3-1 eftir upplegg frá Tony Rasmussen, og so svaraði SÍ tvær ferðir aftur – Jón Nielsen og Jens Erik Rasmussen upp á brotsspark.

So misnýttu sørvingar fleiri ferðir, áðrenn Allan Mørkøre syrgdi fyri heimasigrinum. Fyrst umsetti hann úr ellivu metrum, og so skoraði hann eftir fríspæling frá Jákupi Martin Joensen. Tummas Hans Rubeksen setti punktum við sínum triðja máli.

### Hinir dystirnir

Um TB eftir hetta umfarið fer at verða betri fyri fæst at vita í kvøld, tá ið teir á heimavølli fara at spæla móti VB/Sumba. TB heitti á VB/Sumba um at útseta dystin.

Tað er greitt, at FSV Vágar04 ikki verður partur av kappingini um fremstu plássini. Sunnudagin var FSV04 í Klaksvík, har teir taptu 1-0. Einsamalla málið skoraði KÍ beinanvegin. Jóannes Larsen stýrdi við høvdinum bóltin í málið, eftir veldugt málverjukiks og innlegg frá Kristoffuri Jacobsen.

Leygardagin vórðu ongar útskiftingar gjørdar á Formulaliðnum hjá KÍ. Tí var KÍ manningin góð – eitt nú Kristoffur Jacobsen, Høgni Madsen og Arnhold Joensen – men spælið var einki at reypa av. FSV04 átti mest sum alt spælið, og serliga fram móti dystarenda trýstu teir KÍ. Bólturin var bæði á tvørtrænum og á stólpanum, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin í málið aftanfyri Hera Thorsteinsson, sum var stinnur í málinum.

HB fekk ikki fulla úrtøku, tá ið teir sunnudagin høvdu vitjan av Royn, sum við 2-2 javnleikinum tvífaldaði um samlaðu úrtøkuna. Uni Arge lobbaði eftir framlegging til 1-0, og Hanus Toftheyggj javnaði til 1-1 við rimmar langskoti. Tíðliga í 2. hálvleiki fingu liðini hvør sítt mál. Allan Mikkelsen legði Royn framum eftir trunkaspæl, og John Eystberg javnaði við skoti uttanvert brotsteigin.

Fríggjakvøldið var Royn í Vági, har teir spældu útsettu uppgerðina frá 14. umfari. VB/Sumba vann 4-2 eftir tætta uppgerð. Hvalbingar hildu seg hava uppiborið í hvussu so er eitt stig, men teir høvdu ikki marginalirnar á sínari síðu.

# Kramnik aftur á slóðina

**Eftir at hava verið darvaður av sjúku í nøkur ár, hevur Vladimir Kramnik reist seg aftur. Í mei/juni stóð hann seg sera væl á russiska landsliðnum í talvolympiaduni, og sunnudagin vann hann Dortmund.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Seinastu tvey árini – fram til talvolympiaduna – hevur einki gingið eftir vild hjá 30 ára gamla Vladimir Kramnik. Hann varð nógv kritiseraður fyri at vera ein ov keðiligur telvari, sum ofta leikti skjótir javnleikir. Ratingtal hansara fall eisini nógv, frá yvir 2800 til nærum 2700.

Men fyri einum lítum ári síðani greiddi Kramnik frá sínari sjúku. Ein pínufull nervasjúka, sum serliga ávirkaði rygg hansara. Hann nevndi somuleiðis, at hann fór at taka minst hálvt ára steðg frá telving.

Í mei royndi Kramnik seg av álvara aftur, tá hann við góðum úrslitum mannaði 1. borð á russiska landsliðnum. Í Dortmund prógvaði hann aftur sítt virði sum ein av heimsins bestu telvarum nakrantíð.

### Leko bestu byrjan

Átta telvarar mannaðu í ár "Grand Slam" kappingina í Dortmund. Ilt var at spáa um nakran ávísan favoritt, tí talan varð um nógvir javnsterkir telvarar við drúgvum royndum í slíkum sterkum høpi.

Peter Leko fekk - sum hann mangan plagar - eina góða byrjan. Fram til sjeynda og seinasta umfar var hann fremstur. Men tíverri fyri Leko skuldi hann í 7. umfari hava svart ímóti væl upplagda Kramnik, sum umfari undan hevði vunnið eitt stutt og greitt talv ímóti Jobava Baadur (Talvið hesa vikuna).

Kramnik leikti javnt í sínum fyrstu fimm talvum, men við sigrinum á Jobava og síðani sigrinum á Leko, endaði mæti russin á fremsta plássi.

Peter Svidler hevði somuleiðis eina sera góða kapping og fekk 4,5 stig eins og Kramnik. Ein serlig rokniskipan viðvíkjandi mótstøðustigum viðførdi, at Kramnik varð kosin vinnari av Dortmund 2006.

Boris Gelfand, Michael Adams og Peter Leko endaðu á 3. plássi, hálvt stig aftanfyri Kramnik og Svidler.

**Dortmund 2006**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. Kramnik, Vladimir | 2743 | 4.5 av 7 |
| 2. Svidler, Peter | 2742 | 4.5 |
| 3. Adams, Michael | 2732 | 4.0 |
| 4. Leko, Peter | 2738 | 4.0 |
| 5. Gelfand, Boris | 2729 | 4.0 |
| 6. Naiditsch, Arkadij | 2664 | 3.5 |
| 7. Aronian, Levon | 2761 | 2.0 |
| 8. Jobava, Baadur | 2651 | 1.5 |

### Magnus Carlsen næstan 2700

39th Biel International Festival endaði 4. august. Alexander Morozevich (2731) varð ratingfavorittur og hann vann eisini kappingina rættiliga trygt við 7,5 stigum av 10 møguligum.

Moro vann sjey talv, leikti eitt javnt og tapti tvey. Bæði ímóti 15 ára gamla Magnus Carlsen (2675). Magnus tapti tó síni bæði talv ímóti Andrei Volokitin (2662), og tískil varð hann ov stuttur. Men deilt 2. pláss saman við Teimour Radjabov (2728) er sjálvsagt eitt ótrúliga gott úrslit hjá unga norðmanninum. Teir fingu 6 stig. Við úrslitinum er Magnus tætt við 2700 ratingmarkið.

## Talvið hesa vikuna

**Jobava,Ba (2651) - Kramnik,V (2743)**
Sparkassen Dortmund GER (6), 05.08.2006

**1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Rif3 b6 4.Ric3 Bb7 5.a3 d5 6.cxd5 Rixd5 7.Bd2 Rif6** (Kramnik ynskir helst at halda lív í støðuni við at ikki býta ov nógv fólk av) **8.Fc2 c5 9.dxc5 Bxc5 10.b4 Be7 11.e4 Ric6 12.Bf4 0–0 13.Rd1 Fc8 14.e5?** (Leikurin tykist logiskur, men Kramnik finnur nú eina sterka leikrøð)




**Støðumynd eftir 14. e5**

**14...Rixb4! 15.axb4 Rie4!** (Hóast hvítur er í trupulleikum, var tað óvæntað at Jobava gavst í hesari støðu. Besta royndin hjá hvítum er Rd3 við ætlanini Bd2, men svartur leikar síðani Fc5 og síðani Rc8 við greiðum fyrimuni) **0–1**